Barnagarðurin á Konmansmýru
Hoyvíksvegur 41 b · Tlf. 31-787 · Fax: 31-6076

# PEDAGOGAR

## Vit søkja eftir 3 pedagogum

Søkt verður eftir 3 pedagogum 35 tímar um vikuna, at byrja 1. feb. 2008 ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-6 ár.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
- Trivnaðin
- Opinleika
- Samarbeiði

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi
- At tú heldur tað verða spennandi og mennandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen. TLF. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 4. januar 2008 Barnagarðurin á Konmansmýru

**Barnagarðurin á Kommansmýru**

# Sálarfrøðingur

*Ert tú okkara nýggi starvsfelagi á Føroya Barnaheimi?*

Sálarfrøðingur cand. psych ella cand. pæd. psych søkist til Føroya Barnaheim at starvast 20 tímar um vikuna. Starvið er leyst til setan frá 01.03.2008 ella skjótast til ber.

Barnaheimið er býtt sundur í tvær deildir, ið fevna um eina Ungdómsdeild og eina Familjudeild. Tú verður knýtt/ur afturat virkseminum á báðum deildunum.

- Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er at geva umsorgan og vegleiðing við støði í tí einstaka barninum, samstundis sum reglusemið verður fingið til vega í gerandisdegnum.

- Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er m.a. við eygleiðing, stuðli og vegleiðing, at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og trupulleikar familjan hevur, og meta um, hvat slag av stuðli er mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Søkt verður eftir einum starvsfelaga, sum:**
- er góðkendur sálarfrøðingur ella er í ferð við at gerast liðugur.
- kann gera sálarfrøðiligar kanningar av børnum, ungum og foreldrum.
- helst hevur royndir við ungdóms- og familjuarbeiði.
- vil vera við til áhaldandi at menna arbeiðshættirnar á deildunum.
- kann vera við til at leggja virkisætlanir til rættis fyri familjurnar og tey ungu.
- kann arbeiða sjálvstøðugt við støði í sínum egna yrkiskunnleika og í tøttum samstarvi við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt avbjóðandi starv saman við einum virkisfúsum og tvørfakligum starvsfólkabólki í einum viðurkennandi og óhátíðarligum umhvørvi.
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur í einum umhvørvi í støðugari menning.
- uttanhýsis ráðgeving.
- løn- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

**Umsóknarfreist:**
Umsókn við prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 07.01.2008

Føroya Barnaheim,
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

Meira kann fáast at vita um starvið við at venda tær til Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara, á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

SUNDA KOMMUNA

# Kunngerð

## um broyting í byggisamtyktini fyri Norðskála og Oyrarbakka

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á bygdaráðsfundi tann 17-12-2007 hevur samtykt at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Norðskála og Oyrarbakka.

**Víðkan av ídnaðarøki (við Búðarsteinar) Norðskála.**

Ídnaðarøkið norðan fyri Norðskála verður víðka suðureftir til marki millum matr. 6a og 17a og vestureftir til marki á matr. nr. 6d.

**Víðkan av ídnaðarøki sunnanfyri Streymin**
Ídnaðarøki verður víðka eystureftir móti markinum til matrikul nr. 47 og suðureftir til sunnara enda av matr. nr. 1r og í fjørðuna til sunnara enda á matr. nr. 15b.

Broytingin liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð

**frá 3.01.08 til 24.01.2008 báðir dagar íroknaðir**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í seinasta lagi 03-04-2008.

*Oyrarbakki tann 21-12-2007*

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki




**LOYSNIN!**

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
TEL 310 411 · FARTEL 215 411
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins største úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!